*Løgmaður skal framhaldandi umsita oljumál:*

# -Eg trúgvi olja er í undirgrund okkara

*-Tað er so mikið stórur áhugi fyri føroysku undirgrundini, at eg eri farin at trúgva, at olja er her heldur løgmaður Edmund Joensen, sum eisini sigur, at kósin í oljupolitikkinum hjá nýggju samgonguni verður tann sama.*



*Edmund Joensen, løgmaður -Vit vilja gera alt fyri at halda tíðarætlanina, soleiðis at útbjóðingarumfarið verður sum ætlað*

Jan Muller

Eitt av teimum málsøkjunum, sum væntandi fer at hoyrast meira og meira til sum tíðin gongur er undirgrundin og ein møgulig komandi frálandavinna. Eins og í undanfarnu samgonguni verður tað eisini sjálvur løgmaður, sum skal umsita hetta økið

Edmund Joensen dylur so heldur ikki fyri, at júst hetta økið kanska fer at vera eitt hitt størsta av málsøkjunum í framtíðini

-Vit vita ikki, um olja er her fyrr enn vit hava borað, men tað er alt, sum týðir uppá, at tað er olja føroysku megin eisini, nú oljuvinnan á bretskum øki arbeiðir so nær okkara marki. Sjálvur trúgvi eg, at olja er í undirgrundini sigur Edmund Joensen

**Trygg politisk viðurskifti**

Vit hava spurt løgmann, um henda seinasta stjórnarkreppan fer at hava nakra ávirkan á komandi oljupolitikkin og um ikki ótrygg politisk viðurskifti kunnu gera, at oljufeløgini fara at missa áhuga ella vera meira varin á føroyskum øki'

-Tá vit tosa um oljuvinnu, so tosa vit um eina altjóða vinnu. Tað er greitt, at tað altíð vigar tungt hjá slíkum altjóða feløgum, at tað eru trygg politisk viðurskifti í tí landi, har tey skulu gera íløgur. Hetta kann so ikki júst sigast um Føroyar tey seinastu árini, har Føroyar eru farnar á húsagang og nú so smátt byrja at koma fyri seg aftur

Vit hava havt einar 8 samgongur síðani 1988, men tað gongur rætta vegin, eisini politisk. Tí vit hava nú havt eina samgongu í tvey ár og væntandi varar henda í tvey ár eisini

Edmund Joensen sigur, at tað nýggja, sum er hent, er so tað, at vit hava fingið eina samgongu, sum fer at reka ein meira borgarligan politikk enn tann undanfarna, men hetta merkir sjálvandi ikki, at viðurskiftini gerast meira ótrygg, heldur er tað hinvegin, at vit fáa meira stabil viðurskifti, tí tað fer at verða gjørt meira fyri at fáa búskapin aftur á beint

Løgmaður heldur annars, at tað gongur tann rætta vegin og váttar, at tað verður hildið fram við somu kós í oljupolitikkinum

**Arbeiðsbyrðan nógv størri enn mett**

Hvat hevur løgmaður so at siga til, at frágreiðingin frá Oljuráðleggingarnevndini við uppskot um komandi oljulóggávuna verður nakað seinkað'

-Tað er ofta so, at slíkt arbeiði tekur meiri tíð enn ein roknar við. Frágreiðingin skuldi vera klár í mai ella juni og nú verður tað neyvan fyrr enn í heyst og eg skal viðganga, at hetta er spell. Men hetta er eitt sera rúgvusmikið arbeiði

Harafturat er rætt at vísa á, at fólkini, sum arbeiða við hesum spurningum, høvdu als ikki væntað, at tað fór at vera so stórt virksemi á føroyskum øki og so stórur áhugi fyri Føroyum í heila takið

Uppgávan hevur tí verið nógv størri og harvið truplari enn mett frá byrjan av

Løgmaður heldur annars at tað er gott, at tað er so stórur áhugi fyri føroyska økinum.

**Royna at halda tíðarætlan**

Uppá fyrispurning um fyrsta útbjóðingarumfarið av somu orsøk verður seinkað sigur Edmund Joensen, at tað er ov tíðliga at siga nakað um tað nú, men hann heldur tó, at tað fyribils er rætt at halda seg til verandi tíðarætlan.

-Vit vilja í hvussu gera alt vit eru mentir fyri at fáa hana at halda leggur hann aftrat og heldur fram:

-Men tað er so eisini nakað, sum fyrivarni má takast við, og her er talan um marknatrætuna. Nær hon verður loyst er ikki greitt enn. Hon kemur so at avmarka tað økið, sum vit kunnu bjóða út, tí tað umstridda økið kann ikki vera við í fyrstu syftu

Løgmaður sigur, at hetta sjálvandi er óheppið, men tað kann so ikki forða fyri, at nakað kortini hendir á økinum, um áhugi er fyri tí.

Vit spurdu løgmann um tað er rætt, at ætlanin eftir seinasta samráðingarumfarið millum føroyingar og bretar er at seta ein triðja instans inn í samráðingarnar við bretar, eitt slag av meklara, sum skal royna at fáa partarnar at semjast'

-Tað havi eg onga viðmerking til. Samráðingarnar eru í trúnaði

**Oljupolitikkurin hjá samgonguni**

Sambært samgonguskjalinum hjá nýggju samgonguni, verður sagt, at valdið á undirgrundini verður verandi á føroyskum hondum. Og víðari verður sagt

"Í sambandi við at bjóða út rættindi at leita eftir olju o.ø. á føroyskum øki eigur dentur at verða lagdur á at fáa sum mest burtur úr búskaparliga, við beinleiðis gjøldum fyri rættindi, og at fáa føroyingar í vinnu hjá oljufeløgunum, og treyta okkum, at føroyingar og føroyskar fyritøkur eru so nógv sum gjørligt uppi í tænastuveitingunum

Føroysk vinnuvirki í sambandi við oljuvinnuna eiga at sleppa til arbeiðis sum skjótast

Umráðandi er, at farið verður gjølliga til verka við fyrireikingum og tí neyðuga lóggevandi arbeiðinum

Lóggivið má verða soleiðis, at henda vinna minst møguligt nervar fiskivinnu og umhvørvi

Miðað verður ímóti at verandi teknisk vitan kemur meira til gagna enn higartil."



*Virksemið á oljuøkinum hevur verið nógv størri enn nakar uppruanliga roknaði við. Tí verður frágreiðingin frá Oljuráðleggingarnevndini seinkað nakað. Her limirnir í nevndini uttan fyri høllini hjá Oljufyrisitingini*

